## Veðrið argaði dómararnar

Flogfarið við slovasisku dómarunum setti seg ikki friggjadagin, sum ætlað. Ístaðin komu dómararnir til Føroya góðar tríggjar tímar undan dsytinum. Soleiðis mundi leygarnáttin gerast hampuliga drúgv hjá FSF-umsitingini, sum støðugt mátti arbeiða við alternativum møguleikum, skuldi flogfarið við dómarunum ikki sett seg. Um 10-tíðina leygarmorgunin vóru boðini tó, at flogfarið var farið á flog aftur, og beint eftir klokkan hálvgum eitt kundu teir fýra slovenarnir ganga ígjøgnum tollin á flogvøllinum



## Hugsa um Serbia

Verjuspælarin, Sebastian Prödl, segði, at hann og liðfelagarnir sjálvandi eru serstakliga vónbrotnir um úrslitið á Tórsvølli. – Sjálvandi eru vit tað. Tvey mál vórðu kolldømd, men vit mugu eisini hugsa um hinar møguleikarnar, sum vit ikki gagnnýttu. Vit vistu, at hetta kravdi tol, men tað høvdu vit ikki. Nú er setningurin so at gera tað betri mikudagin, tá vit spæla móti Serbia.

# móti Eysturríki

ikki minst tá ið Eysturríki hevði javnað varð dyggilig staðfesting av, at tað er óneyðugt at eftirmeta og at seta nýggjan málsetning, sum tað so elegant varð sagt av FSF bossinum fyri stuttum.

Avrikið var stutt sagt rimmar fast negling av, at tá ið allir eru tøkir, so eiga Føroyar fótbóltslandslið, sum kann spæla fótbólt og skora mál. Og so eigur at verða lagt afturat, at enn eru ikki allir tøkir. Ingi Højsted er um at vera tað, og Súni Olsen verður tað ikki fyrrenn næsta ár!

### Størstu trumfarnir

Pinnurin hevði ikki verið fleiri ferðir runt, tá ið fyrstu ábendingarnar sóust um, at hetta fór at verða dagurin. Atli Danielsen taklaði so tað hvein í, og Frem miðvallarin traðkaði orduliga í karakter og spældi við so stórum myndugleika og sjálvsáliti, sum hann ongantíð áður hevur gjørt tað á landsliðnum.

Christian Lamhauge Holst var yvir øllum. Hann var kongurin á føroyska liðnum. Tað var hann, sum var orsøkin til, at tað, sum hjá so mongum sær torført út, varð lætt, og mest elegantur var hann, tá ið hann við lítlari fintu fekk tveir av mótstøðumonnunum at leypa á bláman.

Ferð eftir ferð togaði Lamhauge maðurin mótstøðumenninar frá hvørjum øðrum, og Arnbjørn Hansen kundi havt lagt Føroyar á odda stutt undan steðginum.

Liðformaðurin Andreas Ivanschitz ætlaðist at vera snaringspunktið á eysturríkska miðvøllinum. Hann varð tætt ansaður, og hóast tað var neyðugt longu í 1. hálvleiki at gera tvær skiftingar, fór føroyski miðvøllurin ikki um koll.

Bogi Løkin loysti skadda Jákup á Borg av, og tað var sonn fragd at síggja samanspælið millum Jónas, Atla og Boga, sum í høgru gjørdu sær dælt av, at reyðu vongverjarnir ofta vóru frammarlaga.

Miðvallarin í vinstru, Christian Funch, royndi og royndi at bróta ígjøgnum, og í 1. hálvleiki vóru krossbóltarnir nóg so nógvir, og bólturin dansaði onkra ferðina í føroyska málteiginum. Størsta møguleikan fingu eysturríkar, tá ið vindurin spældi Jákupi eitt puss, og bólturin fór í høvdið á Jón Róa Jacobsen, men tíbetur bjargaðu Egil á Bø og stólpin.

Henda støðan kundi kanska verið fráboðan um, at tað sjáldan gongst væl í jubileumsdystum. Men Jákup Mikkelsen gjørdi hesum dyggiliga til skammar. Avrikið hjá 38 ára gamla veteraninum var sum kanska ongantíð áður. Og tá ið hann bjargaði, eftir at framúr arbeiðssami Jónas hevði avrættað, og tá ið flatt innlegg úr vinstru kom í brotsteigin, og málverjin fór í spagat, kendist tað sum um, at tað ikki fór at verða møguleiki fyri einum eysturríkskum máli afturat.

### Intenst álopsspæl

Orkan gekk undan, men hugburðurin og liðskipanin vóru so góð, at tað seinastu løtuna kendist vera eins stórt sannlíki fyri, at heimaliðið fór at skora sigursmálið, sum tað var, at gestirnir fóru at fáa mál.

Eysturríki spenti bogan við at seta álopsspælara inn fyri verjuspælara, og tað órógvaði skipanina eitt vet, at tað síðstu løtuna vóru so nógvir reyðir so frammarlaga á vøllinum.

Men Jógvan Martin Olsen valdi eisini at spenna álopsbogan. Andrew av Fløtum varð settur inn í høgru fyri skadda Boga Løkin. Andrew hevði fína skotroynd, sum Manninger tveitti seg eftir og bjargaði.

Og so varð møguleikin næstan so gyltur, sum hann kundi verða. Eftir horna úr høgru hjá Eysturríki fangaði Christian Lamhauge Holst bóltin á egnum brotsteigarmarki. Lamhauge maðurin hevði orku, hugflog og yvirskot at sneiða framvið tveimum mótstøðumonnum. So spældi hann eitt tvey við deyðmóða Arnbjørn Hansen, sum tíverri ikki var nóg neyvur í sínum avspæli. Um hann hevði havt verið tað, so hevði Lamhauge havt mest sum alla mótstøðuhálvuna fyri seg sjálvan!

Sigursmálið lá í luftini. Tað kundi verið Eysturríki, sum skoraði, og tað hevði ikki verið til at borið eftir fína føroyska avrikið. Men føroyska liðið, sum sýndi djarvt og sannførandi avrik, kundi eisini havt skorað. Tað eydnaðist ikki at endurtaka bragdið frá Landskrona, men tað var tætt við, og 1-1 er væl og virðiliga at liva við.

Christian Lamhauge Holst er komin fyri seg aftur. Hann er kongurin á føroyska liðnum. Og um Jákup, Atli og allir hinir í Kaunas mikukvøldið megna at endurtaka hugburðin, arbeiðið og hugflogið frá leygardegnum, so kann tað væl vera, at tað úrslitið eisini fer at skelka altjóða fótbóltsheimin, tá ið Jógvan Martin Olsen fer at biðja landsliðnum farvæl.



*Føroysku spælararnir vóru mest sum flúgvandi. Her er tað Jónas, sum er kvikari enn eysturríkski mótspælari hansara*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### FAKTA um dystin

**FØROYAR-EYSTURRÍKI 1-1 (0-0)**
*HM undankapping. Leygardagin 11. oktober 2008 kl. 16.00 á Tórsvølli.*
**1-0:** Bogi LØKIN 47.
**1-1:** Martin STRANZL 49.
**Dómarakvartett úr Slovenia:** Darko CEFERIN, Andrej KOKOLJ, Milan KOGEJ og Matej JUG.
**FIFA umboðsmaður úr Svøríki:** Khennet TALLINGER
**DÓMARAEYGLEIÐARI úr Tjekkia:** Karel BOHUNEK
**1890** áskoðarar
**Føroyar:** 1. Jákup MIKKELSEN, 60/-138, liðformaður, KÍ – 2. Jónas Þór NÆS, 4/0, NSÍ, 15. Egil Á BØ, 4/0, EB/Streymur, 5. Jón Rói JACOBSEN, 34/0, Frem DK, 3. Jóhan Troest DAVIDSEN, 8/0, NSÍ – 9. Jákup Á BORG, 57/2, B36 (17. Bogi LØKIN, 4/1, NSÍ, 32./ 6. Andrew AV FLØTUM, 32/2, HB, 74.), 4. Atli DANIELSEN, 29/0, Frem DK, 8. Mikkjal THOMASSEN, 13/0, EB/Streymur (7. Fróði BENJAMINSEN, 49/2, HB, 37.), 10. Christian Høgni JACOBSEN, 45/2, AB DK – 14. Christian Lamhauge HOLST, 12/2, Silkeborg IF DK, 11. Arnbjørn HANSEN, 4/0, EB/Streymur
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Leif NICLASEN, 1/0, EB/Streymur, 13. Bartal ELIASEN, 5/0, ÍF, 16. Gunnar NIELSEN, 0/0, Motherweill FC SC, 18. Bárður OLSEN, 2/0, EB/Streymur
**Gult kort:** Jákup Á BORG 12., Christian Lamhauge HOLST 41.
**Venjari:** Jógvan Martin OLSEN
**Hjálparvenjari:** Jens Martin KNUDSEN
**Eysturríki:** 1. Alexander MANNINGER, 31/-39, Juventus IT -
14. György GARICS (18. Roman KIENAST, 10/1, Helsingborg IF SV,
68. álopsspælari fyri verjuspælara,
15. Sebastian PRÖDL, 16/2, SV Werder Bremen, 3. Martin STRANZL, 51/3, Spartak Moskau, 4. Emanuel POGATETZ, 34/2, FC Middelsbrough - 11. Martin HARNIK, 15/2, SV Werder Bremen (2. Andreas HÖLZL, 1/0, SK Sturm Graz, 26.), 10. Andreas IVANSCHITZ, 46/7, liðformaður, Panathinaikos Athen, 16. Paul SCHARNER, 19/0, Wigan Athletics, 5. Christian FUNCHS, 22/0, VfL Bochum – 17. Marc JANKO, 6/2, RB Salzburg (8. Marko ARNAUTOVIC, 1/0, Twente Enschede NE, 81.), 9. Erwin HOFFER, 7/0, SK Rapid Wien
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Jürgen MACHO, 17/-16, AEK Athen, 6. Jürgen SAMUEL, 16/0, FC Torino, 7. Stefan MAIERHOFFER, 3/0, SK Rapid Wien, 13. Ronald GERCALIU, 13/0, RB Salzburg
**Venjari:** Karel BRÜCKNER